# Hótta við at slíta samstarvið í føðingini

**Tað er so stór ósemja ímillum tær stóru og tær smáu kommunurnar um barnaverndarstovuna í Havn, at vandi er fyri at samstarvið slitnar**

BARNAVERNDARØKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vandi er fyri, at samstarvið ímillum allar kommunurnar í Føroyum um barnaverndarøkið, fer at slitna longu í føðingini.

Tað vóru annars tey flestu sum fegnaðust um, at barnaverndarøkið varð tikið frá landinum og lagt undir kommunurnar at umsita, tí tað skuldi gera alt so nógv betri og effektivari.

Men tað er ikki bara sum at siga tað, tí nú vísir tað seg, at ósemjan ímillum kommunurnar er so stór, at vandi er fyri, at samstarvið slitnar, longu áðrenn tað rættiliga er komið í gongd.

Tað eru teir báðir kommunufelagsskapirnir, Kommunufelagið við teimum smáu kommununum og Kommunusamskipanin við teimum stóru kommununum, sum semjast so illa, at vandi er fyri at samstarvið slitnar.



*Rodmund Nielsen, formaður í Kommunusamskipan Føroya og Rósa Samuelsen, forkvinna í Kommunufelag Føroya, smíltust um alt fimmoyrað, tá ið avtalan um barnaverndarstovuna varð undirskrivað fyrr í ár. Men spurningurin er, hvussu ekta smílið er, tí veruleikin er, at ósemjan er so stór, at vandi er fyri at samstarvið slitnar aftur beinanvegin*

### Í Havn ella á bygd

Í sambandi við at barnaverndarøkið skuldi leggjast undir kommunurnar, skuldi ein felags barnaverndarstova setast á stovn, sum allar kommunurnar skuldu hava til taks. Barnaverndarstovan skal samskipa barnaverndartænastur kring landið og hon skal geva barnverndartænastum í teimum ymsu økjunum ráð. Hon skal eisini skipa fyri undirvísing og skeiðum og at enda skal hon eisini umsita eina fosturforeldraskipan fyri alt landið.

Men tann stóri stríðsspurningurin ímillum kommunurnar er, hvar hendan Barnaverndarstovan skal vera.

Tær stóru kommunurnar í Kommunusamskipan Føroya, hava sett sum ófrávíkiligt krav, at hon verður í Havn.

Men tær smáu kommunurnar í Kommunufelagnum hava hinvegin kravt, at hon verður á bygd.

Kommunufelagið heldur, at kommunurnar eiga at ganga á odda at lagt almenn størv úti um landið, so at eisini onnur øki enn Tórshavn, fingu ágóðan av støðugum, almennum størvum.

Hetta sigur Kommunufelagið í einum skrivi til limakommunurnar fyri stuttum.

Kommunufelagið heldur, at ein slík Barnaverndarstova kann einsvæl verða úti á bygd og hetta hevði verið ein søguligur møguleiki víst í verki, at almennir stovnar einsvæl kunnu liggja uttanfyri Havnina

### Góðtaka eina neyðloysn

Kortini vil Kommunufelagið ikki vera orsøkin til, at arbeiðið at leggja barnaverndarøkið undir kommunurnar, dettur niðurfyri.

Tí góðtekur felagið, at Barnaverndarstovan verður løgd í Havn hetta fyrsta árið.

Men felagið mælir samstundis til, sáttmálin um Barnaverndarstovuna, verður endurskoðaður sum skjótast.

Og vil Kommunusamskipanin framvegis ikki samráðast um at flyta barnaverndarstovuna út á bygd, mælir stýrið fyri Kommunufelagið til, at sáttmálin verður sagdur upp.

Spurningurin er so, hvat hendir um samstarvið slitnar. Ein møguleiki er, at tað vera tvær barnaverndarstovur, ein í Havnini til tær stóru kommunurnar í Kommunusamskipan Føroya og ein úti á bygd til tær smærru kommunurnar í Kommunufelag Føroya.

Men verður hon løgd úti á bygd, fer tað kanska eisini at verða ein spurningur um, hvørjari bygd hon skal vera í???.

# Fáa eitt skotbrá afturat



*Trýstið á politikarar at finna eina skipan, sum sleppur Smyrli og hinum strandfaraskipunum undan arbeiðssteðgum, er linkað eitt sindur- men framvegis kann nógvhenda til jóla*

**Politikarar, sum krevja, at ein skipan verður funnin, so at Strandferðslan verður frítikin fyri arbeiðssteðgir, fáa eitt skotbrá afturat, tí samráðingarnar, sum skuldu vera í hesi løtu, eru útsettar**

STRANDFERÐSLA OG ARBEIÐSSTEÐGIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Teir politikarar, sum krevja, at ein skipan verður funnin, so at Strandferðslan verður undantikin fyri arbeiðssteðgir, fáa eitt skotbrá afturat, tí samráðingarnar, sum skuldu vera í hesi løtu, eru útsettar.

Tað verða nevniligan ongar samráðingar fyribils ímillum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið um sáttmálar fyri teir maskinmeistarar, sum arbeiða hjá tí almenna.

Talan er um sáttmálarnar hjá maskinmeistarunum við Strandferðsluni, teimum sum arbeiða hjá tí almenna á landi, teimum við Magnusi Heinasyni og so teimum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Sáttmálin gekk út 30. september, men varð longdur til í kvøld. 31. oktober.

Men Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sigur, at felagið fer at biðja um at fáa hann longdan í tríggjar vikur afturat.

Tað er samstundis sum sáttmálin hjá Skipara- og Navigatørfelagnum er longud til , men tað er av tilvild, sigur Jógvan Nybo.

Durita Tausen, sum stendur fyri samráðingunum í Fíggjarmálaráðnum, sigur, at sáttmálarnr verða longdir av sær sjálvum, til samráðingar verða

# Hava fingið samstarv yvirum undisjóvartunnilin

**Kommunurnar í Vágum, vestmenningar og kvívíkingar hava gjørt avtalu um eina felags barnavernd**

BARNAVERND
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at allar kommunurnar í vesturøkinum í Føroyum koma at samstarva um eina felags barnavernd.

Tað gjørdust greitt fríggjadagin, tá ið allar kommunurnar í Vágum og Vestmanna- og Kvívíkar Kommuna skrivaðu undir eina avtalu um at samstarva um eina felags barnaverndartænastu. Í Vágum eru tríggjar kommunur: Sørvágur, Miðvágur og Sandavágur.

Sostatt verða allar Vágar og vestursíðan á Streymoy í einum felags barnaverndarøki.

Umsitingin hjá hesi barnaverndartænastuni verður í Sandavági og í tí sambandi skulu hálvtannað fólk arbeiða. Aðrastaðni í Sosialinum í dag er lýsing, har støkt verður eftir starvsfólki, einum leiðara og einum starvsfólki í hálva tíð.

Annars verður ein limur frá hvørjari kommunu í sjálvari barnaverndini og sostatt verða fimm limir í nýggju barnaverndini.



*– Alt vesturøkið í Føroyum er nú savnað í eitt felags barnaverndarøkið og tað heldur borgarstjórin í Sandavági, er ein stórur fyrimunur*

### Ein stórur fyrimunur

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at tað búgva fast í 5000 fólk í hesum barnaverndarøkinum.

– At vit hava fingið so gott samstarv, ger fer at minka munandi um vandan fyri at limirnir í barnaverndini koma í gegnistrupulleikar, tí limurin úr einari kommunu kann altíð taka seg aftur um mál koma til viðgerðar, sum eru ov nær.

– Men ikki minst er tað ein stórur fyrimunur fyri tað fakliga støði hjá barnaverndartænastuni, tí talan verður ikki um eitt einsamalt starvsfólk og tað ein styrki.

Tað verða stór krøv sett til leiðarin, sum verður hann, ið kemur at hava dagligu leiðsluna av barnaverndartænastuni. Tí skal hann hava hóskandi útbúgving og hann skal hava hollan kunnleika til sosiala øki, til kommunal viðurskifti og til fyrisitingarrætt.

Starvsfólkið kann hava eina útbúgving á sosiala økinum.

– Hesi bæði fólkini koma so at manna umisitingina hjá barnaverndini. Leiklutin hjá limunum í barnaverndini verður so at viðgera tey ymsu málini og at taka avgerðir. Umsitingin skal fyrireika tey mál, sum barnaverndin skal viðgerða og hon skal eisini seta avgerðina hjá barnaverndini í verk, sigur Rósa Samuelsen.